## DAGSINS MEINING

# Hvussu væl gongur Fiskavirking og hvør er møguligr keypari?

Ein grundgevingin hjá landsstýrinum og Framtaksgrunninum at selja Føroya Fiskavirking er, at fyritøkan gongur væl, og at tað er best at selja, meðan felagið hevur avlop á hvørjum ári? Ein onnur er, at tað stendur í viðtøkunum, at Fiskavirking skal einskiljast. -Men gongur Fiskavirking so væl? Og hvør er ein møguligur keypari?

Fiskavirking hevur havt avlop, sum hevur ligið millum 15 og 20 mió.kr. tey seinastu árini. Fyritøkan umsetir fyri einar 700 mió.kr. og eginpeningurin er nakað oman fyri 100 mió.kr. Eftir føroyskum viðurskiftum er tað nógv at hava einar 15-18 mió.kr. í avlopi, men eftir útlendskum viðurskiftum er tað lítið og einki, so spurningurin hjá einstaklingum ella íløgufelagsskapum er, um Fiskavirking er eitt nóg áhugavert íløgumál. Í øllum førum er fíggjarliga afturberingin lítil.

Tí skulu óivað onnur endamál liggja til grund enn bara seta pening í fyri at fáa eitt árligt vinningsbýti. Tað skulu vit venda aftur til.

Tá vit tosa um, hvussu væl Fiskavirking gongur, eiga vit eisini at hava í huga, at Fiskavirking selir sjálv sínar fiskavørur. Vanliga tekur ein sølufyritøka í minsta lagi trý prosent í sølugjaldi. Siga vit, at Fiskavirking umsetir fyri 700 mió.kr., merkir tað, at Fiskavirking skuldi fingið einar 20 mió.kr. fyri at selja sínar egnu vørur.

Men avlopið er ikki so stórt. Tað merkir, at annaðhvørt fær Fiskavirking einki fyri at fyri arbeiða fiskin ella sínar fiskavørur. Tað merkir so, at henda fyritøkan og aðrar fiskasølur kappast ikki á jøvnum føti! Ella er hetta ein skeiv meting?

Tað er torført at siga, hvør er áhugaður at keypa Fiskavirking. Tað kann hugsast, at onkur útlendskur matvørurisi er áhugaður at fáa eitt bein inn um føroyska fiskivinnu, sum fær ráfiskin úr heimsins reinasta havumhvørvi. Og tað kann hugsast, at nøkur av teimum føroysku útgerðarvirkjunum, sum hava gingið væl seinastu árini, kasta seg saman at keypa Fiskavirking.

Nú skulu vit ikki fara at selja, men ein annar møguleiki er tað sterka íslendska flutningsfelagið Eimskip, sum óivað roynir at økja sín marknað, bæði her og aðrastaðni. Okkum vitandi hevur Eimskip keypt seg inn í vinnufyritøkur á Norðurlandinum, kanska fyri at tryggja sær flutning, og tað ber altíð til at seta spurnartekin við, um Eimskip ikki kann teljast millum møguligar keyparar ella íleggjarar.

Men eftir øllum at døma leggur landsstýrið sektin á, um útlendsk kapitaláhugamál fara við kjarnuni í føroyskari fiskivinnu á landi. Hetta er annars í andsøgn til tað politiska rákið, sum miðjar ímóti at yvirtaka málsøki, fáa ein sjálvberandi búskap og skipa fullveldi. Men meðan føroyingar skulu stýra landinum, kunnu útlendingar fara við fiskivinnuni, sum hóast alt er krumtappurin í føroyska samfelagnum!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til Hans Andreasen á Argjum

**Svenning av Lofti**



Í samband við at eg, sum formaður, vegna felagið Sinnisbata, mótmælti at Restorffs bryggjarí hevði sent út tíðindaskriv um at nýggja øl teirra var "gott fyri sinnið", og sum Sinnisbati metti verða villeiðandi fyri tey fólk, ið felagið umboðar, skrivaði Hans Andreasen á Argjum eina grein í bløðunum við persónligum álopi á meg. Hans skrivar soleiðis:

"At tú (Svenning) nýtir Sinnisbata sum eina umbering í tínum lesarabrævi 17. Juli, er sera undrunar vert. Hví ikki vera erligur og siga sum er, at tú hatar alt tað, sum inniheldur alkohol."

Góði Hans! Er tað nakað, ið tú ikki kanst ákæra meg fyri, so er tað at vera óerligur. Viðvíkjandi alkoholspurninginum, so havi eg ótaldar ferðir lagt navn til blaðgreinir. Heldur ikki er neyðugt hjá nær at brúka nakran annan "sum eina umbering" fyri tað, ið eg skrivi.

Góði Hans! Eg veit, at eg havi alla nevndina í Sinnisbata aftan fyri meg viðvíkjandi mótmælinum móti tíðindaskrivinum frá Restorfs bryggjaríi. Var tín persónliga ákæra móti mær sonn, so var eg ikki verdur at sita ein dag aftrat sum formaður í einum so virðiligum og alment viðurkendum felagi sum Sinnisbati er, so høvdu sera dugnaligu og medvitandi nevndarlimir felagsins longu havt rópt varskó. Tí kann eg siga, at ákæra tín ikki samsvarar við veruleikan ella sannleikan.

At vit ikki hava somu áskoðanir havi eg ongar trupulleikar av, men tá ið tú alment sáar iva um mítt trúvirði og leggur meg undir at hava fjald motiv, má eg tala at.

Ein persónlig og almenn umbering frá tær hevði tí verið hóskilig – og hevði hon ikki gjørt teg til ein minni mann.

Tú eigur longu mína fyrigeving!

# Jón Kristjánsson, veiðitrýst og fiskidagar

**Hjalti í Jákupsstovu**



ICES og Fiskirannsóknarstovan hava **ikki**, sum Jón Kristjónsson vil vera við, roknað og brúkt tølini frá stovnsmetingunum skeivt. Tað ber til at rokna sum Jón, men sum greitt frá í greinini hjá Peturi Steingrund, førir mátin hjá Jóni Kristjónssyni m.a. til, at veiðan av smáfiski telur mest í úrslitinum, og roknaða veiðitrýstið vil tí skifta ár um ár eftir tilgongdini av ungum fiski.

Løgtingið hevur sett sær fyri, at í miðal skal veiðitrýstið eftir toski, hýsu og upsa undir Føroyum (tann partur av tøka stovninum í tali, sum verður fiskaður í einum ári) ikki vera størri enn 33%. Hesin setningur (veiðisetningur) er fyri at tryggja, at veiðitrýstið ikki verður ov stórt, og fyri at avmarka váðan fyri, at stovnarnir verða fiskaðir niður. ICES metir, at hesin veiðisetningur er í so høgur, men tað er annað mál.

Veiðisetningurin (33%) er settur eftir mátanum, ICES og Fiskirannsóknarstovan nýta at rokna veiðitrýst. Veiðitrýstið eftir toski hevur í fleiri ár verið hægri enn 33%, og skal Løgtingið halda setningin hjá sær sjálvum, er neyðugt at minka um fiskidagatalið. Jón roknar, við sínum máta, at veiðitrýstið eftir toski er 33% og eftir hýsu og upsa væl minni, og tí er alt í lagi í mun til veiðisetningin, eru hansara ráð. Men hetta er **kreativ bókføring**. Skal mátin hjá Jóni nýtast til at rokna veiðitrýst, so má veiðisetningurin eisini ásetast eftir sama máta, og hann verður tá munandi lægri. Ella við øðrum orðum, sjálvt við mátanum hjá Jóni er fiskidagatalið ov høgt.

Fiskidagaskipanina eru flestu føroyingar nøgdir við. Skipanin hevur sínar fyrimunir og vansar, men fyri at nýta ágóðan av fyrimununum, er neyðugt at hava eitt vakið eyga við vansunum. Tann størsti vansin er, at við støðugt vaksandi tøkni og kunnleika veksur effektiviteturin hjá flotanum líðandi ár um ár, og tí er neyðugt støðugt at minka um dagatalið fyri at tálma veiðiorkuni. Men hetta tykjast hvørki vinna ella almennu myndugleikarnir at taka í fullum álvara. Síðan skipanin kom, er veiðitrýstið vaksið, og tað er í løtuni alt ov høgt. Higartil hevur tað gingið væl, tí náttúran hevur verið til vildar. Men vendir náttúran, so klárar tøka veiðiorkan við verandi fiskidøgum í heilt fá ár at fiska stovnarnar niður um øll vandamørk.

Vinnan (Fiskidaganevndin) sigur, at av tí, at stovnarnir eru væl fyri, er ikki neyðugt at minka um dagatalið. Sambært Útvarpi Føroya hava limirnir í Løgtingsins Vinnunevnd somu áskoðan. Men um Løgtingið ikki megnar at gjøgnumføra eina átrokandi neyðuga stilling av fiskidøgunum tá stovnarnir og vinnan eru væl fyri, hvussu skal tað so megna tað, tá stovnarnir eru illa fyri og hvør dagur á sjónum hjá ov nógvum fiskiførum er fyri neyðini.

Við áhaldandi at halda fast við sama dagatal, tekur Løgtingið ikki vansarnar í fiskidagaskipanina fyri fult. Úrslitið verður, at hon brotnar av sær sjálvum uttan mun til, hvussu nógv vit reypa av henni úti og heima.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Vindmyllur og flogvøllur

**Óli Mikkelsen**

Herfyri varð hildin fyrilestrarøð um ymsar orkukeldur. Víst var á, at oljan úr havbotninum ikki kemur at nøkta orkutørvin í framtíðini og at nýtslan av vindorku veksur við rúkandi ferð.

Beinanvegin hoyrist, at menn bbjóða seg fram at seta vindmyllur upp – 3 stórar myllur á Skorðhæddini næsta ár.

**Vindmátingar**
Fyri nøkrum árum síðani vóru vindmátingar gjørdar á ávísum støðum fyri at kanna, hvar framtíðar flogvøllur eigur at vera. Mátingarnar á Skorðhæddini vístu rættiliga javnan vind. Javnur vindur hevur alstóran týdning fyri flogferðsluna – hevur eisini týdning fyri vindmyllur. Niðurstøðan av kanningini var, at tvey pláss stungu seg fram úr til flogvøll: Søltuvík á Sandoynni og Skorðhæddin við Toftir, og tað seinna hevði fyrimun.

Á Skorðhæddini er lætt at gera 2000 m. langa breyt í landnyrðing/útsynning, sum hóskar til ættirnar við mestum vindi. Harafturat ber til at gera uppaftur longri tvørbreyt.

**Kostnaður**
Í 1993 stóð í íslendskum bløðum, at ætlanin var at gera alternativa floghavn á norðurlandinum til floghavnina í Reykjavík. Breytin skuldi vera 2000 m. long, kostnaðarætlanin var 200 mill. í okkara krónum. Eftir hesum koma vit langt fyri tað, ein stórur trolari kostar.

**Ósambæriligt**
Gott hevði verið, um flogvøllur og vindmyllur kundu verið á sama stað, men tað ber ikki til.

Stórur tørvur verður óivað í framtíðini á góðum flogvølli og vindmyllum, og pláss eigur at verða fyri báðum.

Tveita vit vindmyllur út sum best ber til, koma vit at skíta okkum inni – tað var stór skomm á torvheiðunum. Vit skulu hugsa okkum um.

Vindmyllur hava stórt umhvørvisligt árin við sær – bæði sjónligt og við óljóði. Skulu tær muna á orkutørvinum, koma nógvar upp at standa – vit fáa heilar skógir av myllum.




**Kanningar neyðugar**
Flogvallarmálið eigur at endurskoðast. Vindmátingar skulu gerast við atliti bæði til framtíðar flogvøll og framtíðar vindmyllur. Eini tvey ár kundu verið brúkt til hetta.

Leypa vit framav, koma vit okkum í rasshaft.

# Útisjónleikur ólavsøkudag

TÍÐINDASKRIV

Ólavsøkudag kl. 14.30 byrjar tann stóri útisjónleikurin.

Sjónleikurin byrjar upp á trøðni yvirav Føroya Banka við SMS.

Har verður tann fyrsti leikurin spældur, síðani flytur bólkurin av tónleikarum og sjónleikarum seg oman móti niðara parti av Viðarlunini, oman gjøgnum Niels Finsensgøtu, í Steinatún, oman eftir Tórsgøtu, niðan á Vaglið og út á økið niðanfyri Skansan, har verður endaleikurin spældur,og er hetta leikur um tá Føroyar vóru kristnaðar.

Á leiðini frá trøðni yvirav Føroya Banka og út til økið við Skansan verður steðgað á 12 ferðir og smáir leikir, dansir og tónleikur verða spældir.

M.a. kærleiksøgan um ein frosk sum bleiv til eina brúður sum finnur sær ein brúðgomm, klovnaleikur, Reyðhetta og Kloss Hans, søgan um Sjálvátarin, tær Illu Ommurnar o.a.

Umframt sjónleikarar og dansarar er ein rúgva av okkara bestu trummusláarum og blásarum við og seta teir eisini sín serliga dám á tiltakið.

Tað er MáF og Gríma sum skipa fyri hesum stóra tiltakið við fólki úr Klaksvík, av Strondum, Norðskála og Havn. Upp ímóti 100 luttakarar eru við tilsamans.

Tiltakið kemur at taka umleið 2 tímar.

# Stórt barnatiltak í Badmintonhøllini á ólavsøku

TÍÐINDARSKRIV

Leygardegin 27. juli kl.17.00 verður eitt stórt barnatiltak í badmintonhøllini.

Tey í luttaka eru, Angela og klovnurin Hannibal í øll børn kenna, gandakallurin (Bobo) og Fjotti, Føroya bestu gandakallar, Arnfríð og Rannvá í syngja nøkur góð og kend barnaløg.

Angela og hannibal hava áður upptrakka saman við Fjotta og Bobo og hevur tað verði eitt brak av undirhaldi her stemningurin er heilt í topp.

Sum prikkurin yvur i´-num, fara tær báðar systrarnar við teirra framúr skarandi vøkru røddum at syngja nakrar barna sangir, har børnini kunnu syngja við.

Tá hesi seks koma saman er lagt upp til eina ógloymandi løtu, í børnini leingi koma at minnast.

Tað verður bert tann eina sýningin í ár.

Atgongumerkir kunna keypast ein tíma áðrenn sýning og fram til sýningina, kløø 17.00.

Eisini kunna tær keypast frá klovnunum í ganga rundt í býnum fríggjadagin frá kl. 14.00, atgongumerki kostar 50,- kr.



# Nú verða føroyameistararnir funnir

TÍÐINDASKRIV

Ólavsøkan stendur fyri durum, og við henni endar kappróðrarárið. Nakrir føroyameistarar eru longu funnir, men í fleiri førum verða meistararnir ikki kosnir, fyrr enn síðsta takið er tikið.

Hesa ferð verður tað nýggi mentamálaráðharrin, Annlis Bjarkhamar, sum fer at handa vinnandi bátum ognarsteyp og heiðursmerki. Og eins og í fjør er tað Føroya Bjór, sum letur heiðurslutirnar.

Við vón um ein spennandi ólavsøkuróður ynskir Róðrarsamband Føroya bæði kappróðrarfólki og áskoðarum eina góða ólavsøku.